# Stjørnan spennir seg út

**Til komandi kappingarár hevur hondbóltsfelagið Stjørnan úr Klaksvík fingið tríggjar nýggjar jugoslavar til kvinnuliðið. Harumframt verða tríggir fyrrverandi stjørnuleikarar aftur at síggja á liðnum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Annika Ljósstein hevur spælt við Kyndli í nøkur ár, men nú verður hon aftur at síggja í reyðu troyggjuni hjá Stjørnuni. Her er hon í dysti fyri Kyndil ímóti Stjørnuni*

*Savnsmynd*

Stjørnar satsar til komandi kappingarár hjá kvinnum. Nevndin hevur nevniliga fingið ikki færri enn tríggjar jugoslaviskar leikarar til felagið. Tann eina av kvinnunum, sum kemur hendavegin, skal eisini vera leikandi venjari.

Venjarin eitur Jelena Barlov. Hon er ein allround spælari og er 23 ára gomul.

Síðani er tað Katarina Stjepanov, ið er 21 ára gomul. Hon spælir vanliga á høgra bakki. Og at enda er tað Lidija Vlajic, ið er málverji. Hon er 20 ára gomul, men hevur longu spælt í trý ár í bestu deildini í Jugoslavia.

– Vit satsa í ár, og tað er neyðugt at styrkja hópin, um vit skulu gera okkum vónir um at vinna meistaraheitið, sigur Kristoffur Ragnarsson, formaður í Stjørnuni.

Stjørnan hevur áður havt tilsamans fýra útlendingar, og teir flestu hava roynst ógvuliga væl.

Tær tríggjar jugoslavisku kvinnurnar skulu arbeiða við síðuna av hondbóltinum. Tær hava allar fingið arbeiði í fiskivinnu á landi í Klaksvík. Hetta er neyðugt, um tær skuldu fáa uppihaldsloyvi í Føroyum.

## Tríggir gamlir kenningar

Umframt hesar tríggjar útlendsku leikararnar verða tríggir heimligir leikarar, sum áður hava roynst væl hjá Stjørnuni, aftur at síggja í KÍ-høllini.

Talan er um Onnu Kristinu Samson, Joan Midjord Joensen og Anniku Ljósstein.

Anna Kristina Samson hevur fyri stuttum átt, og hon spældi tí ikki seinasta kappingarár. Joan Midjord Joensen, sum spældi nakrar dystir við Stjørnuni móti endanum av seinasta kappingarári eftir at hava verið uttanlands, verður nú verandi í Klaksvík og fer eisini at spæla við klaksvíksfelagnum.

Annika Ljósstein hevur búð í Havn í nøkur ár og hevur spælt við Kyndli. Hon vendir nú heimaftur til Klaksvíkar.

Tað eru nøkur ár síðan, at Stjørnan vann FM-heitið, men nú sær út til at Stjørnan verður ein av favorittunum til komandi kappingarár.

## Ungdómsvenjari

Stjørnan hevur eisini sett ein ungdómsvenjara til komandi vetur. Tað er havnarmaðurin Rógvi Nielsen, sum áður hevur verið venjari hjá Stjørnuni, ið skal venja tey ungu hjá Stjørnuni.









Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ:

# – Vit skulu tora at spæla

**Í kvøld klokkan 19 fer NSÍ at spæla sín fyrsta dyst í evropeiskum fótbólti nakrantíð. Mótstøðuliðið er norska felagið Lyn, sum kropsliga er sera væl fyri**

UEFA CUP
*Stefan í Skorini*



*– Vit skulu tora at spæla fótbólt. Tað er vónleyst at fara inn at berjast ímóti norðmonnum, tí teir eru sterkari og kropsliga betur fyri enn vit, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ*

Jógvan Martin Olsen og hansara menn hava lagt seinastu hond á fyrireikingarnar undan UEFA Cup dystinum ímóti Lyn á Svangaskarði í kvøld. Lykilin til eitt gott úrslit er, at NSÍ leikararnir skulu tora at spæla fótbólt.

– Vit skulu tora at spæla fótbólt. Tað er vónleyst at fara inn at berjast ímóti norðmonnum, tí teir eru sterkari og betri fyri kropsliga enn vit, sigur Jógvan Martin Olsen, sum hevur góðar vónir til dystin.

## Fullmannaðir

Hjá NSÍ eru allir mans tøkir til dystin, og tað er óivað tørvur á øllum kreftum til dystin í kvøld.

Nýggi leikarin Karsten From verður ikki við, tí at hann longu hevur spælt ein Evropa Cup dyst í hesum kappingarárinum, og tað er ikki loyvi at spæla við fleiri liðum í evropeiskum kappingum í sama kappingarári.

– Kropsliga eru teir sera væl fyri, og teir spæla tann vanliga norska fótbóltin við nógvari ferð. Tekniskt eru teir ikki serliga góðir, og liðið leggur seg ikki eftir at spæla kombinatiónsfótbólt, sigur Jógvan Martin um mótstøðuliðið.

Lyn fær nógv mál eftir deyðbóltar, og tí skulu runavíkingar vera væl fyrireikaðir til slíkar støður.

Jógvan Martin vísir á, at føroysk lið ofta eru ókonsentrerað í slíkum støðum. Sum dømi vísir hann á dystin hjá HB ímóti FBK Kaunas á Tórsvølli, tá HB verjan varð tikin á bóli eftir ein vanligan deyðbólt.

## Eitt felag í kreppu

Lyn endaði á øðrum plássi í undanfarna kappingarári, og soleiðis eydnaðist tað at koma við í UEFA Cup.

Í ár hevur úrtøkan tó verið væl lakari. Liðið liggur á triðaftasta plássi í Tippeligaini, og tað hevur havt við sær, at bossarnir í felagnum hava skorið nógv niður í fíggjarætlanini hjá felagnum. Hetta hevur skapt órógv í felagnum, og hetta tykist at ávirka leikararnar á vøllinum.

Í seinasta dystinum tapti Lyn 2-0 ímóti besta norska felagnum, Rosenborg. Bert átta minuttir vóru eftir at spæla, tá Rosenborg fekk hol á.

Millum størstu profilarnir í Lyn er Steven Lustü, sum vit kenna frá Herfølge, har hann saman við Jákupi Mikkelsen vann danska meistaraheitið. Aðrir kendir leikarar eru áleyparin Helgi Sigurðsson, sum spælir við íslendska landsliðnum, og miðvallarin Jan Derek Sørensen, sum áður hevur spælt við týska stórfelagnum Borussia Dortmund.




